## Nýggjur danskur flokkur

Leiðarin á danska faðirshúsinum, Ruth Evensen, er í holt við at seta nýggjan politiskan flokk á stovn. Flokkurin er ein kristin flokkur, og skal bera heitið Frihedspartiet. Í tíðindaskrivi boðar Ruth Evensen frá, at stigið er tikið eftir stóru broytingina í fosturtøkukjakinum. Ruth hevur stovnað flokkin saman við Eivind Fønss og Agner Dalgaard, og flokkurin fer í næstum til góðkenningar av heiti, heimasíðu, valfrágreiðslu og flokslista.



## Nintendo Wii ávegis heimsmeti

Nýggja útgávan hjá Nintendo, Nintendo Wii, hevur gingið sum heitt breyð, síðan tað kom út á gøtuna novembur í fjør. – Playstation 2 hjá Sony hevur selt yvir 100 mió. eintøk, sum er eitt sera stór upphædd, ið vit enn ikki hava rokkið, sigur Satoru Iwata, ovasti í Nintendo, við Reuters. Uppá eitt hálv ár hevur Nintendo selt 5,8 mió. Wii-útgávur, og gongst eftir ætlan, verður metið hjá Playstation sligið.

# Útjavning kann skjótt gerast veruleiki

**Eitt uppskot um at javna skattainntøkurnar yvir allar kommunurnar liggur klárt í kommunutilmælinum. Hetta er ein skipan, sum verður brúkt í øllum Norðanlondum, sigur Hilmar Høgenni, deildarstjóri í Innlendismálaráðnum**

ÚTJAVNING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú tosið hevur verið frammi um eina sonevnda útjavningarskipan av skattapenginum millum kommunurnar, gevur borgarstjórin í Havn ilt av sær. Hann sigur seg umhugsa, at krevja skatt frá teimum avbygdafólkum, sum arbeiða í Havn.

Fíggjarmálaráðharrin, Magni Laksáfoss, hevur annars givið til kennar sína hugsan um málið á fundi við kommunufelagsskapirnar, og hann rør heilt greitt framundir at fáa sett eina javningarskipan í verk millum kommunurnar.

Og ein slík skipan liggur sum so klár, tí kommununevndin, sum gjørdi álit um nýggjan kommunubygnað, hevur eisini viðgjørt hetta málið. Ein slík skipan gongur í stuttum út upp á at javna kommunuskattin út frá tveimum sjónarmiðum, inntøkugrundarlagi hjá kommununum og útreiðslutørvin.

Út frá hesum báðum skal so ein javning fara fram, roknað út eftir íbúgvaratalinum í kommununi. Vístu dømini ganga út frá »ideella« talinum á kommunum, nevniliga sjey. Men sjálvandi ber til at javna eisini um talið er størri enn so.

Men dentur verður lagdur á, at skulu kommunurnar hava neyðugu fíggjarligu orkuna at veita øllum borgarum somu tænastuna, er eisini neyðugt við ávísum íbúgvaragrundarlagi í ymsu kommununum.

Hetta er annars ein skipan, sum verður nýtt í øllum okkara grannalondum, hóast skipanin er ymisk frá landi til land. Í summum londum er tað landið, sum krevur inn allan skatt fyri síðani at býta hann út aftur á kommunurnar eftir ávísum leisti.

Í Danmark er støðan so hon, at eisini ein blokkstuðulsskipan er inni í myndini, men trupulleiin við tí er, at skipanin gerst so torskilt, at næstan eingin skilir hana. Og tað er eisini ein trupulleiki við donsku skipanini, vísir Hilmar Høgenni, deildarstjóri í Innlendismálaráðnum á.

### Eftir tørvi

Í uppskotinum hjá kommununevndini eru dømi nevnd um, hvussu ein slík skipan kann virka. Dømi verður tikið millum tvær ímyndaðar kommunur, har inntøkugrundarlagið í aðrari kommuni er tvífalt so stórt sum í hinari. Í slíkum føri hevði kommunan við størra inntøkugrundarlagnum javna pening til hina við tí minna inntøkugrundarlagnum.

Men tað er bert annar parturin í skipanini. Hin parturin er útreiðslugrundarlagið. Í einum øðrum ímyndaðum dømi eru tvífalt so nógv børn í einari kommunu enn í einari aðrari. Í hesum førinum hevði kommunan við færri børnum javna til hina við teimum fleiri børnunum.

Hesi bæði kriteriir skulu síðani sjóðast saman í eina eind, sum so skal geva endaliga úrslitið.

Landsstýrið hevur jú í mong ár havt í kvittanum at leggja alt fleiri uppgávur út á kommunurnar, og tað sigur seg sjálvt, at um kommunurnar ikki hava neyðugu fíggjarligu orkuna at veita tær tænastur, sum landið leggur út á tær, er lítið vunnið.

Útjavningarskipanin er eisini ætlað út frá teirri áskoðan, at allar kommunur kunnu veita sínum borgarum áleið somu tænastur. Í øllum førum er tí neyðugt, at kommunurnar hava eina passandi støðd, tí annars ber slíkt ikki til.

Sjálvandi halda tær kommunur, sum fara at fáa pening eftir einari útjavningarskipan, at hetta er eitt gott hugskot, meðan tær kommunur, sum noyðast at lata frá sær, ivaleyst ikki eru so glaðar fyri eina slíka skipan.



*Streymoyarøkið og serliga Havnin fer eftir uppskotinum at javna pening út til hini økini*

# Kollveltandi uppfinning

**Tveir australiumenn hava uppfunnið ein generator, sum framleiðir fimm ferðir so nógva orku, sum hann brúkar**

UPPFINNING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað ljóðar næstan ov gott at vera satt. Men sambært Sky News hava tveir australiumenn upp á tað nærmasta uppfunnið ævinleikamaskinuna.

John Christie, annar av uppfinnarunum, sigur við Sky News, at hann og makkarin Lou, hava arbeitt við verkætlanini í seks ár, og nú er so komið á mál.

-Generatorurin framleiðir 24 KW um døgnið, og tá hann er startaður kann hann koyra í áravís uttan at steðga, sigur John Christie.

Generatorurin er gjørdur av eitt nú magnetum, og eingin, sum hevur sæð hann, hevur pástaðið, at hann ikki virkar. Íleggjarar standa eisini í røð at sleppa framat at fíggja hópframleiðslu av undurverkinum.

Steve Bressington, sum er inginørur, ivast ikki í, at hetta er ein framtíðar maskina. Hann hevur fylgt við og hevur sjálvandi eisini sæð generatorin, og hann er sannførdur um, at hetta er ein kollveltandi uppfinning.



*Heldur uppfinningin hjá australiumonnunum tað, sum teir lova, verður skjótt ikki brúk fyri hvørki motorunum á Sundsverkinum ella SEV*

Á universitetinum í Sydney eru tey tó eitt sindur meiri varin, og vilja ikki siga so nógv, fyrr enn generatorurin er royndur av óheftum serfrøðingum. Men, siga tey, er hetta satt, verða vit noydd at umskriva fleiri av fysisku lógunum.

John Christie er tó ikki í iva um uppfinningina. Hann ivast ikki í, at tá generatorurin er innstalleraður í kjallaranum ella garaguni og startaður, verða familjurnar sjálvforsýnandi við orku, uttan at tað kostar teimum eitt einasta oyra.

Generatorurin fer at kosta einar 5000 dollarar og verður klárur til framleiðslu innan eitt ár frá nú, sigur stolti uppfinnarin við Sky News.